## Tilboðið

**Hetta er tilboðið, sum Vágs Býráð fekk frá landsstýrinum leygardagin**

Á fundi leygardagin, gav landsstýrið Vágs, Býráð eitt tilboð. Tað var at flyta ætlaða miðnámsskúlan til Hovs og leggja hann har sum ein part í einum skúladepli í Hovi, sum eisini skuldi rúma heilsuskúlanum og kanska øðrum skúlum við.

Afturfyri skuldi eitt røktarheim til 35 fólk byggjast á stykkinum í Vági, sum grivið út til miðnámsskúlan.

Eitt røktarheim er ógvuliga starvsfólkakrevjandi og har eru run troknað eitt starvsfólk til hvørt búfólk.

Sostatt hevði talan verið um at sett 35 nýggj, almenn størv á stovn í Vági. Hetta er talan um føst størv, sum krevja útbúgvingar og har lønin er hampuliga góð. Og her er talan um fastar inntøkur, sum eru fullkomiliga óávirkaðar av vánaligum fiskiskapi og sveiggjum í búskapinum annars. Sostatt er talan um sera støðugar inntøkur antin tíðirnar so eru góðar ella ringar.

Harumframt er í nógv mestan mun talan um konufólkastørv, sum stórt trot er á frammanundan.

Men Býráðið tók ikki av hesum tilboði!

Borgarstjórin segði við Sosialin í gjár, at ongar ætlanir eru um røktarheim og tað er ein kommunal uppgáva, ið eigur at koma frá kommununum sjálvum. Harafturat hevur Vága Býráð stríðst fyri at fáa miðnámsskúlan. Men vil landsstyrið byggja røktarheim, hava vágbingar onki ímóti tí, sama hvar tað verður bygt, tí tá eru vágbingar eisini við, tí kommunurnar eru felags um røktarheim, segði Jógvan Krosslá við Sosialin í gjár.

# Vindur í Vági

**Ódnarveður herjaði landið mánakvøldið og eins og í restini av landinum merktist hetta í Vági. Vindurin var nógvur og m.a. merktist tað í skúlagarðinum í Vági, har regntungu graslíkismátturnar fóru uppfrá og langa leið**

VINDUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Ódnarveðrið mánakvøldið merktist kring alt landið. Regn og vindur. Í Vági vóru áirnar um at fara um áarbakkarnar og nógvi vindurin tók ymiskt við sær, so sum takplátur og annað. Menn sóust úti í fer við at bjarga tekjum og leysagóðsi.

Í skúlagarðinum í Vági, á skúlalagnum, liggja tungar graslíkismáttur, sum komu at liggja har í fjør, eftir at vágbingar fingu nýggjan fótbóltsvøll á Eiðinum.

Mátturnar eru tungar og seymaðar saman tvær og tvær. Fleiri mans máttu til at bera tær, tá tær skuldu leggjast. Nógv regn hevur eisini verið seinnu dagarnar og ger tað mátturnar tyngri.

Men stormurin mánakvøldið var harður og regntungu grasmátturnar í uttara enda av garðinum máttu víkja. Tær fóru við vindinum og upp um hegnið og hetta sigur eitt sindur um vindmegina, sum hevur verið upp á spæl mánakvøldið.

# Vit høvdu gleðiliga sagt ja takk

**– Hevði Tvøroyrar Býráð fingið sama tilboð frá Landsstýrinum sum Vágs Býráð fekk leygardagin, høvdu vit gleðiliga tikið av, sigur borgarstjórin**

MENNINGARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað kann ikki vera meiningin at Vágs Býráð skal vera einsamalt um at avgera, hvat skal henda í Suðuroynni. Hinar kommunurnar mugu eisini sleppa upp í part, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri*

– Eg skilji ikki, at vágbingar kunnu siga nei til flyta miðnámsskúlan til Hovs afturfyri at fáa 35 almenn arbeiðspláss til Suðuroyar.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, er hálvgum skelkaður av at Vágs Býráð ikki vildi taka av tilboðnum, sum tað fekk frá landsstýrinum leygardagin.

Hann sigur, at fekk Tvøroyrar Býráð eitt tilboð frá landsstýrinum um at fingið 35 almenn størv til oynna afturfyri at flutt heilsuskúlan til Hovs, hevði Býráðið gleðiliga tikið av.

– Tað einasta, sum hevur týdning, er at skúlin verður verandi í oynni.

Hann sigur, at fastar, almennar inntøkur hava serstakliga stóran týdning fyri eitt pláss.

– Tað eru í veruleikanum tær føstu inntøkurnar, sum bera øllum uppi.

Hann nevnir at í Kvívík búgva 200 færri fólk enn í Hvalba, men í Kvívík er inntøkan av kommunuskatti kortini tvær milliónir hægri enn í Hvalba.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at tað er eitt dømi um, hvussu stóran týdning tær almennu lønirnar hava fyri kommunukassarnar, tí flestu kvívíkingar arbeiða í Havn, har teir hava fastar lønir, sum í nógvum førum eru almennar.

Vágs Býráð heldur, at hóast tað blivu 35 almenn størv í Vági, er tað ikki vist, at tað hevði komið Vági til góðar, tí talan hevði bara verið um, at vágbingar, sum arbeiddu á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri og á Suðuroyar Sjúkrahúsi, høvdu skift starv og høvdu komið suður at arbeitt.

Slíka grundgeing skilir Kristin Michelsen ikki.

– Vágs Býráð kann ikki fáa trygd fyri, at tað bara skulu vera vágbingar, sum skuldu fingið starv á einum nýggjum røktarheimi í Vági. Men eg ivist ikki í, at onkur hevði búsetst seg í Vági. Og annars hevði talan verið um at stovna 35 nýggj, almenn størv í Suðuroy. Tað hevði havt sera stóran týdning, so tað er trupult at skilja, at Vágs Býráð havnaði tilboðnum, sigur Kristin Michelsen.

Og so er hann fullkomiliga ósamdur við Vágs Býráð í, at eldraøkið er eitt kommunalt málsøki.

– Tað er tað ikki. Tað er tvørturímóti 100% ein landsuppgáva, tí kommunurnar hava ikki yvirtikið eldraøkið.

– At fleiri kommunur so hava gjørt eina dáragerð og hava bygt sambýli, er tað sama sum at sleppa landsstýrinum undan ábyrgdini, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

### Skuldu fingið sama tilboð

Annars fýlist hann á, at tað bara er Vágs Býráð, sum hevur fingið slíkt tilboð frá landsstýrinum.

Og nú vágbingar ikki tóku av, er vandi fyri, at ætlanin dettur niðurfyri.

– Tað kann ikki vera meiningin, at tað skal vera Vágs Býráð, sum einsamalt ger av, hvat skal henda í Suðuroynni.

Tí vónar hann heldur ikki, at Landsstýrið sleppur ætlanini, bara tí Vágs Býráð er ímóti, tí Suðuroyggin er annað og meiri enn Vágs Býráð.

Sostatt heldur hann eisini, at tað var ikki meiri enn rímiligt, at Tvøroyrar Kommuna fekk sama tilboð í sambandi við heilsuskúlan.

Annars heldur borgarstjórin á Tvøroyri, at tað er langt úti, at Landsstýrið samráðist við Vágs Býráð um eina ætlan, sum eisini umfatar heilsuskúlan á Tvøroyri, uttan at spyrja Tvøroyrar Býráð eftir.

– Og tað ger landsstýrið aftanfyri ryggin á Tvøroyrar Kommunu, hóast vit hava siti á fundi eftir fundi við skiftandi mentamálaráðharrar um viðurskiftini hjá heilsuskúlanum. Og so fáa vit onki at vita, fyrrenn vit frætta tað í fjølmiðlunum. Tað er ov langt úti, heldur borgarstjórin á Tvøroyri.

Hann sigur eisini, at vil Landsstýrið byggja røktarheim á Tvøroyri, skulu teir saktans fáa øki at byggja tað á.

– So nú sita vit spent og bíða, um Tvøroyrar Býráð eisini fer at fáa eitt tilboð frá landsstýrinum, leggur Kristin Michelsen afturat.

### Ongan týdning hvar hann er

Nú sigur borgarstjórin í Vági, at vil landsstýrið gera ein skúladepil, kunnu teir gera hann í Vági. Hvat hevði Tvøroyrar Býráð sagt, um tað fekk tað tilboð frá landsstýrinm, at eitt røktarheim til 35 fólk varð bygt á Tvøroyri afturfyri at heilsuskúlin verður fluttur til Vágs til ein skúladepil har?

– Ein skúladepil í Vági er ikki er sambæriligur við tað, sum hevur ligið í kortunum um at savna oynna í færri kommunur. Eftir tí upplegginum skuldu skúlarnir vera í Hovi, sum er mitt í oynni.

– Kortini vænti eg, at býráðið hevði tikið undir við tí. Sjálvur haldi eg, at tað, sum hevur størstan týdning, er, at skúlin verður varðveittur í oynni. Og við tí fyrivarni, at býráðið ikki hevur viðgjørt spurningin, vænti eg, at støðan hjá øllum býráðnum hevði verið tann sama.,

– Høvdu vit fingið okkurt afturfyri, høvdu vit uttan iva verið sinnað til at slept skúlanum – um hann so endaði í Vági, hóast. sigur Kristin Michelsen.

– Tað er ikki bara støðan í Vági, sum er hættislig. Hon er hættislig í allari oynni, leggur hann afturat. Hann fýlist eisini á, at Hendrik Old og Johan Dahl skuldu vera við á fundinum í Vági sum eygleiðarar.

– Vit hava tveir aðrar løgtingsmenn í oynni, Sverra Midjord og Hergeir Nielsen og sjálvsagt skuldu eisini teir fingið fundarboð, heldur Kristin Michelsen.



# Heldur miðnámsskúla í Vági enn røktarheim

**Verður rætt atborið, verður ein miðnámsskúli ein nógv størri vinningur fyri Vág enn eitt røktarheim, heldur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur**

MENNINGARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Ein miðnámsskúli í Vági, sum væl útnyttaður, er ein nógvstørri vinningur fyri Vág, enn eitt røktarheim hevði verið, heldur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur á franskingardeplinum fyri økismenning í Vági*

Tað var rætt av Vágs Býráð at havna tilboðnum frá landsstýrinum.

Tað heldur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur.

Hann ivast í, at tilboðið, sum býráðið fekk frá landsstýrinum leygardagin, er nakar vinningur fyri Vág.

Kortini heldur hann, at tað er positivt, at arbeitt verður við ítøkiligum menningarætlanum.

Á fundi leygardagin vildi Landsstýrið hava Vágs Býráð at góðtaka, at ætlaði miðnámsskúlin í Vági verður fluttur til Hovs.

Afturfyri skuldi landsstýrið byggja eitt røktarheim á stykkinum, sum varð ætlað til miðnámsskúlan í Vági.

Hetta skuldi verið eitt røktarheim til 35 búfólk og tað hevði eisini kravt 35 starvsfólk.

Agnið hjá landsstýrinum var sostatt, at við at flyta miðnámsskúlan til Vágs, hevði Vágur fingið 35 nýggj, almenn størv.

Men Býráðið havnaði tilboðnum. Og tað heldur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur á Granskingardeplinum fyri Økismenning í Vági, var ein røtt avgerð.

– Tað er ein nógv størri vinningur fyri Vág at fáa ein miðnámsskúla enn tað er at fáa eitt røktarheim, heldur hann.

Annars dugur samfelagsfrøðingurin ikki at síggja, hví ein miðnámsskúli í Vági og eitt røktarheim skulu vera slíkir mótsetningar, at teir útihýsa hvønn annan.

– Heldur landið at tað er tørvur á einum røktarheimi í Suðuroy og at tað kundi verið ein framstig í royndunum at ment økið, so er bara bar byggja eitt røktarheim, uttan at blanda miðnámsskúlan uppí, sigur hann.

– Eg sakni rætt og slætt eina góða grundgeving fyri at annað útihýsir hitt, tí tað kann ikki vera rætt, at landsstýrið hevur ta støðu, at siga vágbingar nei til at flyta skúlan til Hovs, siga teir samstundis nei til eitt røktarheim.

– Skal miðnámsskúlin flytast til Hovs, skal øll ætlanin broytast og tað kostar pening. Samstundis skal fimleikarhøll og aðrar umstøður til ítrótt gerast í Hovi og tað kostar eisini nógv.

– Og annars haldi eg, at tað er náturligt, at heilsuskúlin er nær við sjúkrahúsinum og ellis- og røktarheiminum, sigur samfelagsfrøðingurin úr Vági.

### Ein kraftig dynamo

Dennis Holm sigur, at verður hugt eftir, hvørji øki í Evropa tað eru, sum veksa og mennast, so eru tað tey økini, sum hava útbúgvingar.

Annars heldur hann, at fyri arbeiðskraftina hevur tað lítlan týdning fyri Suðuroynni, hvar stovnar eru, tí Suðuroyggin er ein arbeiðsmarknaður og fólk koyra nógv meiri ímillum bygdir í sambandi við arbeiði enn vit kanska geva okkum far um. Og tá ið Hovstunnilin er gjørdur, er ógvuliga skjótt at koyra ímillum.

– Sostatt ger tað at kalla tað sama, hvar í Suðuroynni, eitt røktarheim verður bygt, tí tað verður ein styrkur fyri alla oynna.

– Hinvegin, so má útgangspunktið fyri at byggja eitt røktarheim verða, at tørvur er á tí, og ikki tað at skapa arbeiðspláss.

Hann heldur, at ein miðnámsskúli kundi verið ein kraftig dynamo fyri Vág og alt økið rundanum hann og fyri alla oynna sum heild.

– Tað verður eitt heilt serligt lív rundanum ein slíkan skúla og tað hevði ikki givið somu ávirkan at flutt hann til Hovs.

– Eg haldi, at tað yvirhøvur hevur stóra undirtøku, at skúlin er í Vági. Tað vísur tann stóra tilgongdin av næmingum úr allari oynni.

– Tað er eisini gott fyri oynna og fyri suðuroyingar, at teir koma hvørjum øðrum við og ganga inn til hvønn annnan, so at siga. Eg haldi, at tey ungu, sum hvønn dag ganga í Vági í miðnámskúlan, hava ein heilt annan hugburð til eina samansjóðing av oynni, enn tey gomlu. Eg haldi eisini, at teir suðuroyingar, sum arbeiða í øðrum bygdum, hava ein heilt annan hugburð til at samansjóða oynna, enn tey hava, sum bara eru innanfyri ongjargarðarnar.

– Verður skúlin lagdur í eitt púra óheft stað í ongamannalandi, sum í Hovi, kann verða, at hendan ávirkanin ikki verður eins stór.

– Tann stóra avbjóðingin verður at fylla karmarnir í miðnámsskúlanum. Endamálið við honum var nevniliga at hann skuldi verða ein miðdepil fyri útbúgving og mentan. Tað merkir, at eftir vanliga skúlatíð er ætlanin, at skúlin skal brúkast til kvøldskúla, eftirútbúgvingar, skeiðsdepil og til mentanartiltøk.

– Serliga nú møguleikarnir fyri fjarundirvísing eru vorðnir so góðir, eru heilt góðir møguleikar fyri at fylla karmarnir í skúlanum, so at hann ikki bara verður ein studentaskúli, sum er opin frá 8-15, men ein útbúgvingar- og mentanarmiðdepil, sum er opin og fullur av lívi langt út á kvøldið.

– Tí var tað eitt álvarsligt bakkast fyri ætlanina, at ætlaða meginbókasavnið varð av ongum, tí tað kundi havt stóan týdning fyri ein slíkan depil, sigur Dennis.